LM-066/2025


Jenny Jacksdóttir Toftegaard

Fra: \"Jóhan D. Nónstein\" <johannonstein@gmail.com>
Sendt: fríggjadagur, 14. november 2025 16:19
Til: Journalin hjá LMS
Emne: Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð)

Ummæli

Prestfjall, sunnari partur, hevur hesar viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð):

Sambært lógaruppskotinum verður ásett í § 3, stk. 1, nr. 7, at vegurin í Hvalba er við í forprosjektinum og fer eftir ætlan at liggja rundanum verandi vegir í Hvalba. Ætlanin er at gera ein veg sambært reglum fyri H1 vegi við 80 km hámarksferð, sí niðanfyri.



Ætlaða linjuføringin á vegnum í Prestfjalli er broytt í nýggja lógaruppskotinum samanborið við upprunaligu linjuføringina, sí

niðanfyri.



Nýggja linjuføringin rakar ikki verandi rulluportur og fer at ávirka vetrarbitið hjá Prestfjalli sunnara parti munandi, tí hon gongur at kalla mitt ígjøgnum allar Slokkatraðirnar.

Tá ið Landsverk gjørdi nýggja landsvegin til Hvalbiartunnilin varð vegurin lagdur soleiðis, at hann í minst møguligan mun skuldi ganga ígjøgnum traðirnar. Hetta tók eisini gamla linjuføringin í uppskotinum til Suðuroyartunnil hædd fyri.

Um linjuføringin ikki verður broytt aftur til upprunaligu linjuføringina verður neyðugt, at gera seyðasmogur undir vegnum, so seyðurin í Prestfjalli fær atgongd til vetrarbitið.

Vinarliga

Hagastýrið fyri Prestfjall, sunnari partur

Jóhan D. Nónstein, formaður

Fartlf. 548613

LM-066/2025